Fríggjadag 3. kl. 13.55



Triði veraldarbardagi CANAL+
Ræðandi aktuellur spenningsfilmur um ein yvirgangsmann, sum letur eina deyðiliga biologiska virus fara í umferð. Nakað sum skapar ræðslu í øllum USA. Kanska mest ræðandi er, at filmurin varð framleiddur bert tveir mánaðir undan 11. september í 2001 og eftirfylgjandi miltbrandsatsóknirnar.

Fríggjadag 3. kl. 18.00

Fres
Angela og Olgar eru bæði úr Havn og Olgar dugir ikki nøvnini á øllum bygdunum í Føroyum.Tey hava eitt Føroyakort og Angela peikar á kortið og so fara tey til ta bygdina, sum Angela peikar á. Hesaferð peikaði Angela á Oyrarbakka og har er ein frítíðarskúli, sum tey bæði vitja. Børnini syngja og tekna og spæla spøl. Og sjálvandi er eitt góður teknifilmur eisini, hann eitur Rosita. Hvar man Angela peika næstu ferð — kanska verður tað har, sum tú býrt?

Fríggjadag 3. kl. 20.40



Tú skjýtur – eg smíli
Mel Gibson og Goldie Hawn hava her høvuðsleiklutirnar í spenningsfilminum um Rick Jarmine, sum hevur framt nøkur stór mistøk í lívi sínum. Hann hevur í fleiri ár broytt samleika sín, og er fluttur úr stað til stað, men brádliga hittir hann gomlu flammu sína Marianne, og eins og fleiri onnur, so ivaðist hon onga løtu í, at Rick var deyður og jarðaður.

Fríggjadag 3. kl. 23.45



SOAP
Billy greiðir Jessicu frá trupulleikum sínum,soleiðis at hon veit um hann og læraran. Samstundis roynir Burt at fáa Mary at skilja, at hann hevur verið í song við einari rúmdarveru.

Leygardag 4. kl. 17.30

Bestseller
Vit hyggja at bestu bókunum, sum eru skrivaðar á bæði donskum og øðrum útlendskum málum. Eisini verður hugt at, hvussu leikur fór, tá altjóða rithøvundavirðislønirnar vórðu handaðar í ár.

Leygardag 4. kl. 18.05

Vild med racehunde
Liz nýtir alla sína tíð til at ala pekingesarar. Jackie er júst byrjaður við sínum sankt bernhardshundum, og Steve hevur gjørt av, at hann skal gera sitt til, at Rottweilarar verða betri umtóktir. Men hvat er tað, sum fær slík fólk at nýta so nógva tíð og orku til hundar.

Leygardag 4. kl.18.30

A Diva's Christmas Carol
Sangarinnan og superdivan, Ebony Scrooge, heldur jólini vera eina tíð, har hon kann gera sær dælt av góða viljanum hjá øllum í umhvørvi hennara, soleiðis at hon kann fáa sum mest í sín part. Men ein dagin kemur andin hjá einum fyrrverandi songfelaga til hennara, og tað fær hana at umhugsa støðu sína.

Leygardag 4. kl. 20.35



E.T.
Framtíðarfilmur um eitt sjáldsamt vinalag. 10 ára gamli Elliot kemur fram á eina rúmdarveru, E.T., sum onkursvegnað er endað á jørðini. Elliot tekur E.T. heim til hús og E.T. tykist at trívast hampuliga væl saman við familjuni, men honum leingist illa heim til síni á fremmandu gongustjørnuni. Elliot fer tískil í holtur við at skipa fyri ferðini.

Sunnudag 5. kl. 15.25

Ull og spuni
Hetta er ein sendiróð í trimum pørtum, sum Føroya Heimavirkisfelag hevur framleitt. Greitt verður frá, hvussu vanligt var at handfara ull frá tí at seyðurin verður kliptur til ullin er spunnin til tógv og nýtt til binding, veving og annað. Nikolina Beder greiðir frá og vísir í verki, hvussu arbeitt verður. Millum frágreiðingarnar eru myndatøkur av seyði í haganum. Fyrsti partur snýr seg um at fáa ullina til høldar, at vaska og viðgera hana, áðrenn farið verður at karða og spinna.

Sunnudag 5. kl. 15.20

Heilt hysterisk
Pápi Edinu doyr, og Saffy roynir at leggja eina vakra jarðarferð til rættis. Edina fer at hugsa um egna deyða sín, og ger í somu løtu av, at Saffy so ikki skal arva nakað, og tí fer hon heldur at leita sær eftir nøkrum dýrum málningum.

Sunnudag 5. kl. 21.50

Corrina, Corrina CANAL+
Tá 6-ára gamla Molly missir mammu sína, ger hon av at avbyrgja seg frá umheiminum. Samstundis leitar pápin eftir hjálp til húsarhaldið, og mitt í øllum kemur Corrina upp í leikin. Og hon veit ráð. Bæði viðvíkjandi ólukkuligum gentum og hjálparsleysum páptum.

Sunnudag 5. kl. 1.45

Bloody Mama
Í depressiónsárunum í USA verða borgararnir í Ozark-fjallalendinum hóttir upp á lívi av einum einum ránsmannaliði. Talan er tó ikki um nakað vanligt brotsmannalið, tí alt, sum hesir gera, er væl og virðiliga lagt til rættis.

Mánadag 6. kl. 20.00



Racismunnar ljóta andlit
Spencer er ein harður dedektivur, sum ein dagin fær eitt vandamikið mál latið í hendurnar. Ein ungur, svartur maður tykist vera dømdur uttan orsøk fyri morðið á ein hvítan mann. Spencer fær hjálp frá millum øðrum Susan, sum er sálarfrøðingur, men innan leingi eru tey bæði í lívsvanda.

Mánadag 6. kl. 20.35

Cosmos Kaos – við Peter Madsen
Cosmos fer hesaferð í holt við Brøndby-leikaran, Peter Madsen. Harumframt verða eisini verjuleikarin Kenneth Rasmussen og Málverjin Carsten Ankergren at hitta, og so verður dystast í brotsspørkum, driblingum, tacklingum og øðrum.

Mánadag 6. kl. 21.00

Gerandishetjur
Gary Brown hevur í fleiri ár stríðst fyri at útbúgva eitt lið av neyðhjálparmonnum í Sioux City í Iowa. Ein dagin er ein spreinging í motorinum á einum DC10-flogfarið, og skiparin biðjur Gary um loyvi at neyðlenda í býnum.

Mánadag 6. kl. 22.35

Ginusnið
Amerikonsk dokumentar. Alt kann snøggast á kroppi tínum, bara tú eigur fyri læknaviðgerðina. Eisini ginan, sum kynslutirnir á konufólki eita nú á døgum. Nógvar konur siga seg vera ónøgdar við sínar ginur, eftir at tær hava átt børn, og rætt er tað, at barnsburður ofta fer illa við teimum. Men eisini ungar konur, sum ikki hava átt halda, at tær ikki hava nóg mikið at vísa fram fyri niðan.

Týsdag 7. kl. 18.30

Fimta gear
Fyrsta bilmagasinið í DR snýr seg sum vera man um bilar. Her siggja vit millum annað royndarkoyringar av tí nýggja Lamborghini Murcielago, nýggja C-3'aranum hjá Citroen og 7'ara røðini hjá BMW.

Týsdag 7. kl. 19.30

FBI-files
Í februar mánaði í 1990 rýmdi ein 14-ára gomul genta heimanifrá. Eingin dugdi at siga, hvar hon var farin, og mamman hevði bert vónina um, at løgreglan fann hana, áðrenn ov seint var. Tíverri vísti hendan vónin seg ikki at halda.

Týsdag 7. kl. 20.00

Storm
Í 1992 arbeiddi Roberts generalur við eini ætlan, sum skuldi gera hann føran fyri at stýra veðurlagnum, men nakað gongur galið. Sjey ár seinni hóttir ein orkan við leggja Los Angeles í oyði, og Ron Young ger alt tað hann kann, til tess at bjarga býnum.

Týsdag 7. kl. 20.55

Siamesiskir tvíburðar
Allison og David Lawler skulu hava teirra fyrsta barn, tá ein ultraljóðkanning avdúkar, at Allison ber tvíburar. Og ikki bara tað – børnini hava eitt og sama hjarta. Fýra mánaðar eru til Allison skal eiga og nú kemur ein tíð við nógvari stúran. Eitt sjónvarpslið fylgir foreldrunum. Eisini hitta vit onnur siamesisk tvíburapør.

Mikudag 8. kl. 15.30



The Wayan's Bros
Marlon er forelskaður í eini vakrari sangarinnu, sum hinvegin heldur meira um Shawn. HEtta tí hann tykist fullkomuliga líkasælu um hana. Og skjótt eru brøðrirnir báðir farnir í holt við at stríðast um tokkan hjá vøkru kvinnuni.

Mikudag 8. kl. 20.00



Undan væðingini
Føroyskt bátasmíð 2:2. Vit vísa annan part av sendingini um føroyskt bátasmíð. Símun Jóhan Wolles smíðar bátin og greiðir frá handverkinum.

Mikudag 8. kl. 20.00

Billy Elliot CANAL+ GUL
Pápin hjá 11-ára gamla Billy Elliot er minuarbeiðari í Thatcher-Onglandi í 1984, tá stóra kolaverkfallið stóð á. Tá pápin og beiggin finna út av, at Billy stendur og sær væl á ballett-liðnum hjá skúlanum, verða teir í øðini, men sjálvur vil Billy ikki geva seg uttan viðari.

Mikudag 8. kl. 21.30

DR Explorer
Vit eru við á heimsins longstu, og helst eisini gitnastu, jarnbreytarferð. Nevnliga eftir Transsibirisku jarnbreytini, har vit hoyra um kendar søgur frá kupeunum, etivognunum og sjálvandi eisini frá ymsu tokstøðunum á vegnum gjøgnum Russland, Mongolie og Kina.

Hósdag 9. kl. 11.05

Mik Schacks Hjemmeservice
Hesaferð hevur Mik Schack vitjan av kokkinum, Claus Christensen. Spurningurin er so, hvat teir báðir fara at fáa á skaftið.

Hósdag 9. kl. 19.35



Vakurleiki fyri ein og hvønn prís
At vinna eina vakurleikakapping er at sammeta við eitt ævintýr. Eftir bert eini stuttari løtu verður lívið hjá vinnarunum fullkomuliga broytt. Men tað eru tó ikki bert ljósar síður at finna í hesum, og í veruleikanum krevur hetta eisini meira enn bara tað at síggja gott út.

Hósdag 8. kl. 21.45

Eitt mál fyri Frost
Frost er í ferð við at seta alt upp á pláss í nýumvælda húsi sínum, tá hann noyðist til arbeiðis. Ein ung genta, sum ongan góðan eigur, er druknað. Morð ella sjálvmorð? Meðan Frost kannar málið, fær hann eitt mál afturat at kanna. Ein maður, sum starvast hjá heilsufrøðiligu myndugleikunum, hvørvur, eftir at hann hevur verið og vitja í einum sláturvirki. Er eitt brotsverk framt móti honum?

Hósdag 9. kl. 01.30

Wiseguy
Vinnie kemur í trupulleikar, tá mamma hansara verður niðursligin í Brooklyn og hareftir innløgd. Sonny hevur syrgt fyri, at mamman fær bestu hugsandi viðgerðina, men hetta kostar, og tað hevur hann ikki sagt Sonny.

Mánadagur 6. kl. 19.00

Skúlagáttin Skoðanir úr skúlanum

Gestur í ársins fyrstu sending er landsstýrismaðurin í mentamálum Annlis Bjarkhamar. Í kjalarvørrinum av kjakinum um hin góða fólkaskúlan fer hon nú undir eina umfatandi atgerðarætlan á fólkaskúlaøkinum. Undir heitinum „SÚS", sum stendur fyri skoðanir úr skúlanum, kemur eitt rit um skúlaviðurskifti út 20. januar. Síðani verður farið á rundferð til allar skúlar. Atgerðarætlanin hjá fólkaskúladeildini í Mentamálaráðnum fevnir m.a. um felags virðisgrundarlag og ítøkilig viðurskifti sum undirvísingartilfar og mannagongdir, tá umræður happing. Arbeiðið við atgerðarætlanin verður liðugt 1. apríl og fer at fevna um eitt fýra ára skeið. Harafturat arbeiðir Annlis Bjarkhamar við nýggjari læraraútbúgving, sum skal byrja í august 2004. Í sendingini hoyra vit eisini Gyðju Hjalmarsdóttir, Paula Nielsen og Bjarna í Líða. Birgir Kruse leggur sendingin til rættis.

CANAL+

Sunnudagin kl. 22.00
NHL Íshockey: Atlanta-Philadelphia
Mikudagin kl. 0.30
NHL Íshockey: Florida-Detroit

DR1

Fríggjadagin kl. 20.40
EC Hondbóltur: GOG-Slagelse, kvinnur
Sunnudagin kl. 14.00
EC Hondbóltur: Leipzig-Viborg, kvinnur
Mánadagin kl. 10.00
V5-trav: Beinleiðis úr Lunden

DR2

Sunnudagin kl. 14.25
V5-trav: Beinleiðis úr Lunden

EUROSPORT

Eurosport hesa vikuna
Rally: Dakar 2003
Snowboard WC úr Tandåadalen, Svøríki
Freestyle WC úr Tignes, Fraklandi
Skíðlop WC úr Reit im Winkl, Týsklandi
Langrenn WC úr Reit im Winkl, Týsklandi
Tennis ATP úr Quatar
Skíðlop úr Innsbruck, Eysturríki
Skjótrenning á skoytum EM úr Heerenveen, Hollandi
Alpint WC úr Kranjska Gora, Slovenia
Langrenn WC úr Kavgolovo, Russlandi
Alpint WC úr Berchtesgaden, Týsklandi
Supercross úr Arnhem, Holland.´í
Skíðlop WC úr Schonach, Týsklandi
Tennis WTA úr Sydney, Australia
Tennis ATP úr Sydney, Australia

TV2 ZULU

Leygardagin kl. 17.40
FA Cup: Southampton-Tottenham
Sunnudagin kl. 12.55
FA Cup: Mancester City-Liverpool
Sunnudagin kl. 14.55
Íshockey: Frederikshavn-Herlev
Sunnudagin kl. 17.10
FA Cup: Wolverhampton-Newcastle
Sunnudagin kl. 18.00
NFL Beinleiðis

TV DANMARK 1

Sunnudagin kl. 20.25
NBA: L.A. Clippers-San Antonio

VARPIÐ
Eykablað í Sosialinum hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 311820
Fax: 314720
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Layout: Team 85
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin